## Steypavinnarar

**Menn 1955–2000**

1955: HB
1956: TB
1957: HB
1958: TB
1959: HB
1960: TB
1961: TB
1962: HB
1963: HB
1964: HB
(ísafjarðarbikarið ogn hjá HB)
1965: B36
1966: KÍ
1967: KÍ
1968: HB
1969: HB
1970: kappingin strikað
1971: HB
1972: HB
1973: HB
(ísafjarðarsúlan ogn hjá HB)
1974: VB
1975: HB
1976: HB
1977: TB
1978: HB
1979: HB
1980: HB
(ísafjarðarsúlan ogn hjá HB)
1981: HB
1982: HB
1983: GÍ
1984: HB
1985: GÍ
1986: NSÍ
1987: HB
1988: HB
(ísafjarðarsúlan ogn hjá HB)
1989: HB
1990: KÍ
1991: B36
1992: HB
1993: B71
1994: KÍ
1995: HB
1996: GÍ
1997: GÍ
1998: HB
(løgmanssteypið ogn hjá HB)
1999: KÍ
2000: GÍ

HB 25 ferðir
TB 5 ferðir
KÍ 5 ferðir
GÍ 5 ferðir
B36 2 ferðir
VB 1 ferð
NSÍ 1 ferð
B71 1 ferð

**Kvinnur 1990–2000**

1990: HB
1991: B36
1992: Skáli
1993: B36
1994: B36
1995: B36
1996: HB
1997: B36
(steypið ogn hjá B36)
1998: HB
1999: HB
2000: KÍ

B36 5 ferðir
HB 4 ferðir
Skáli 1 ferð
KÍ 1 ferð

# Nýtt B36 ættarlið kann vinna fyrstu kappingina

*Jan Joensen og Arnbjørn Danielsen dystast á ólavsøku um Løgmanssteypin*



**B36 liðið fer í kvøld úr Havnini og inn á Svangaskarð, har síðstu fyrireikingarnar skulu gerast til steypafinaluna**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tað fer at kennast sum ein serliga søtur biti, um tað seinnapartin í morgin fer at eydnast B36 at vinna løgmanssteypið. Teir í árstalsfelagnum hava nógvu tey seinnu árini fingið skotið í skógvarnar, at stuðlarnir á liðnum fyrst og fremst hava verið spælarar, ið hava verið uppaldir í øðrum feløgum, meðan røttu B36-arnir meiri ella minni hava verið ífylla.

Tað hava verið nógvir spælarar í B36, sum eru komnir aðra staðni frá. Og tað er einki at ivast í, at teir, sum eru komnir úr øðrum feløgum, og sum nú eru á B36 liðnum, høvdu pyntað um á øllum hinum liðunum í bestu deildini. Heðin á Lakjuni, Magni á Lakjuni, John Petersen, Arnbjørn Danielsen og Pól Thorsteinsson eru allir góðir spælarar, og ivaleyst vera teir allir ella næstan allir ímillum teir fyrstu ellivu hjá Piotr Krakowski í morgin.

Men tað er samstundis ein royndur lutur, at eitt nýtt ættarlið av evnaríkum spælarum, sum eru uppvaksnir í B36, hevur í morgin møguleikan at vera við til at vinna fyrstu stóru kappingina í bestu deildini fyri barndómsfelagið.

– Eg var við, tá B36 vann meistaraskapið í 1997. Síðani tá eru fleiri av teimum, sum eg spældi saman við í yngru deildunum, komnir afturat. Vit vunnu nógv í yngru deildunum, men vit hava einki vunnið í 1. deild, síðani javnaldrarnir hjá mær komu upp í bestu deildina.

Tað sigur Jákup á Borg, sum hevur verið fastur maður á B36 liðnum fýra tey seinastu árini, og sum má metast millum avgjørdu stuðulsspælararnar hjá B36. Ein av spælarunum, sum hann sipar til, er Herbert í Lon Jacobsen, sum undan summarfrítíðini var nógv skaddur, men sum nú er tøkur aftur. Hann er sera skjótur og avgjørdur verjuspælari, og tað er rættuliga sannlíkt, at hann verður settur at taka sær av Kurt Mørkøre.

Ein annar av nýggja B36 ættarliðnum er Kenneth Jacobsen, og ein triði er Klæmint Matras. Saman við Tróndi Vatnhamar, sum í fyrstuni var neyðloysn í málinum, men sum nú er vorðin upplagda fyrsta valið, eru allir hesir fastir menn á liðnum. Ein annar av nýggja B36 ættarliðnum er Fróði Clementsen, sum í fyrraárið var í B68 og fekk sær royndir sum 1. deildarspælari.

– Hjá okkum øllum hevði tað verið framúr at vunnið løgmanssteypið á ólavsøku. Hetta er eisini síðsti møguleikin hjá onkrum av spælarunum í hesum umfarinum at vinna nakað við B36, tí bæði Herbert í Lon Jacobsen og Jan Guttesen vera ikki so drúgvir eftir summarsteðgin. Teir skulu niður í útbúgvingarørindum, veit Jákup á Borg at siga okkum.

### Fara úr høvuðsstaðnum

B36 hevur vant dúgliga síðstu vikurnar. Sunnudagin vunnu teir 4–0 á ÍF, og síðani tá hava teir ikki spælt dyst.

Pól Thorsteinsson hevur verið burturi í summarfrí. Hann var fyrstu ferð til venjingar aftur mikudagin. Allir eru tøkir. Einasta lítla ivamálið var í gjár Jákup á Borg:

– Eg vóni sanniliga, at tað fer at bera mær til at spæla. Í síðstu løtu í venjingini hóskvøldið fekk eg ein løst í fótliðin, men tað skal nógv til, áðrenn eg gevi skarvin yvir. Eg rokni við, at fysioterapeuturin fær bilbukt við skaðan.

Í gjárkvøldið skuldu B36arnir leggja síðstu hond á venjingarnar uppundir finaluna. Í dag fara teir at ganga í skrúðgongu, tá ólavsøkan verður sett, og so hava teir fingið boð um at møta aftur seint í kvøld.

– Tað er ikki tí, at venjarin ikki hevur álit á okkum. Tað er meiri tað, at tað verður mett, at vit í ólavsøkumeldrinum ikki fara at fáa høvi at savna hugsanirnar hjá okkum um finaluna. Tí fara vit úr Havnini leygarkvøldið klokkan tíggju. Vit fara inn á Svangaskarð, har vit skulu kobla úr og hvíla okkum, so vit vera so væl fyri, sum tað ber til, tá vit koma suður aftur til finaluna.

### Leikluturin nyttar einki

Tá vit líta at støðutalvuni eftir tey fyrstu tíggju umførini í landskappingini, so er skjótt at koma eftir, at B36 hevur favorittleiklutin í finaluni. Men tað leggur Jákup á Borg ikki nógv í:

– Landskappingin og steypakappingin eru púra hvør sítt. Tað sæst kring allan knøttin. Vit kunnu eisini venda tí tann vegin, at KÍ hevur í ár staðið seg betri í steypakappingini, enn vit hava gjørt. Vit fara í hvussu so er ikki á vøllin við tí í huganum, at vit fyri stuttum vunnu nógv á KÍ í Gundadali, og at vit eru betri fyri í landskappingini, enn teir eru.

### Dysturin á stólunum

Finalan millum B36 og KÍ í morgin verður fyrsti týdningarmikli dysturin á Tórsvølli millum tvey føroysk lið. Eftir atgongumerkjasøluni at døma, so verður fullsett.

– Tað hevur stóran týdning fyri avrikið, at tú kennir, at áskoðararnir taka dyggiliga á og liva við. Í finaluni fyri tveimum árum síðani var tað eingin ivi um, at tað vóru klaksvíkingarnir, sum vóru óføari at dríva á sínar spælarar, enn áskoðararnir hjá okkum vóru at dríva á okkum. Eg vóni og rokni faktiskt eisini við, at okkara áskoðarar fara at geva ljóð frá sær hesa ferð, so tað ikki bara verða KÍ róp at hoyra í Gundadali á ólavsøku, heldur Jákup á Borg.



# Sigrarnir liggja eftir heima við hús

**Lykilin til sannførandi sigrarnar hjá Havnarbátinum higartil í ár hevur – umframt heilt nógva venjing – sambært bátsformannin verið neyðuga virðingin fyri næsta róðrinum og mótstøðumonnunum**

10-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*



*Vandin lúrir alla tíðina, at tú ikki skalt taka uppgávuna, sum stendur fyri framman, í tí álvara, sum tað er alneyðugt at taka hana, um eitt gott úrslit skal spyrjast burturúr, sigur Magni Brøðraberg, bátsformaður á Havnabátinum*

Havnarbáturin hevur verið einastandandi í ár. Tað eru manningarnar umborð á hinum 10–mannaførunum samdar um. Og tað er eingin ivi um, at tað eru FM vinnararnir umborð á Havnarbátinum, sum eru stórfavorittar at vinna á ólavsøku. Um teir gera tað, so verður talan um eitt verdugt punktum fyri eitt frágera gott róðrarár hjá teimum.

– Tað nyttar lítið hjá okkum at hava skoðsmálið frá kappingarneytunum og áskoðarunum við okkum út á málið. Vandin lúrir alla tíðina, at tú ikki skalt taka uppgávuna, sum stendur fyri framman, í tí álvara, sum tað er alneyðugt at taka hana, um eitt gott úrslit skal spyrjast burturúr.

Tað er bátsformaðurin á Havnarbátinum, sum vit hava í telefonini. Magni Brøðraberg og bátsfelagarnir vandu mikukvøldið síðstu ferð undan ólavsøkuni. Í hesi vikuni hava teir vant teinin av Argjahøvda og inn undir Skipafelagið aftur og aftur. Teir hava róð ímóti Knørri og Kollfirðingi. Føturnir eru á bekkinum allan teinin, og tað hevur gingið væl.

Í dag eru síðstu fyrireikingarnar á skránni, og tær eru sinniligar:

– Vit hittast fyri at eta saman, áðrenn vit fara at ganga í skrúðgonguni, tá ólavsøkan verður sett. Ein av bátsfeløgunum býr ikki so langt frá, har bátarnir standa, so eftir at ólavsøkan verður sett, fara vit beinleiðis heim til hansara, og so verður alt sett inn upp á at savna hugsanirnar um sjálvan róðurin. Vit halda tað vera sera týdningarmikið, at vit eru felags um hetta. Ein partur av hesum er, at vit mugu gloyma at dúva uppá, at tað hevur gingið so væl higartil í ár. Nú snýr tað seg bara um ólavsøkuróðurin, sigur Magni Brøðraberg.

### Long fyrireiking

Nú kappingarárið er um at vera liðugt, kunnu teir umborð á Havnarbátinum líta aftur á eitt langt róðrarár:

– Vit fóru undir styrkisvenjingar longu í januar, og tá fóru vit eisini regluliga at renna. Vit fóru ikki í bátin fyrrenn flaggdagin, men tá vóru vit í góðari konditión. Einar tveir dagar undan flaggdegnum runnu vit úr neystinum í Álakeri og til Kirkjubøar og aftur. Tað er 25 kilometrar, og tað kláraðu vit við ein glans, sigur bátsformaðurin, sum eisini hevur eina frágreiðing til tað, sum verður sagt um, at Havnarbáturin flýtur so serliga væl og gongur so lættliga og uttan, at tað á nakran hátt sær óstortligt út:

– Vit brúktu nógva tíð tær fyrstu vikurnar upp á at finna røttu javnvágina umborð. Hetta hevur t. d. nakað við stødd og vekt á monnunum at gera, soleiðis at teir tyngru eru longri frammi í bátinum og teir lættaru longri afturi. Fyrstu tíðina róðu vit ofta langar teinar fyri at finna rætta áralagið og róðrarlagið, og tá tað var komið upp á pláss fóru vit uppundir norðoyarstevnuna at venja intervalvenjing.

Tit høvdu umleið somu manning í fjør, men tá gekk ikki so væl?

– Tað er partvís rætt. Síðani í fjør havav vit skift umleið helmingin av manningini út. Í fjør var tað ikki fyrrenn heilt stutt undan norðoyarstevnuni, at vit fóru umborð á Havnarbátin. Vit høvdu vant við Ørvi, og vit høvdu rættað okkum inn eftir tí bátinum. Tíðin umborð á Havnarbátinum gjørdist ov stutt. Tað er so sera ymiskt, sum bátarnir eru. Í ár hava vit havt møguleika at fáa skil á tí, sum vit ikki høvdu tíð til í fjør. Og so mugu vit ikki gloyma, at vit hava ein fínan stýrimann, sum so serliga væl megnar at bera okkum fram.

### Fleiri ætla sær at bjóða av

Havnarbáturin er stór favorittur av vinna ólavsøkuróðurin, og tað verður sjálvandi eitt vónbrot, um báturin, sum higartil hevur vunnið allar róðrarnar, ikki fer at megna at vinna í heimasjógvi.

Men Magni Brøðrarberg sigur seg rokna við kapping frá Vestmenninginum, Eysturoyinginum og Nólsoyinginum. Hann veit at siga, at nólsloyingar hava skift eitt sindur av fólki, og at Nólsoyingurin hevur gingið væl í venjingini upp undir ólavsøkuna.

Umborð á Vestmenninginum hava teir ætlað sær at vunnið ein róður í ár. Nú er seinasti møguleikin, og Vestmenningur hevur ofta staðið seg væl á ólavsøku.

– So er tað Eysturoyingurin. Hann hevur í undanfarnu kappingunum ofta fingið góðan start og verið væl við á fyrra helminginum av teimum tvey túsund metrunum, vísir formaðurin á Havnarbátinum á.

Rúni Lamhauge er bátsformaður umborð á Eysturoyingi. Hann er partur av manning, sum tók við, eftir at nýggi báturin hjá teimum hevði vunnið allar róðrarnar í 1998 og í 1999. Tað eru nakrir fáir av gomlu manningini umborð, meðan helmingurin roynir seg á øðrum ári, og ein einstakur ikki hevur róð á ólavsøku áður:

– Tað gekst einki serliga at manna bátin í vár. Undan norðoyarstevnuni høvdu vit bara vant í fýra vikur. Tá var konditiónin ikki góð, men hon er batnað nógv. Tað hevur hilnast betri hjá okkum, tá hann hevur verið ímóti, enn tá hann hevur verið undan. Tað kemst av, at vit í miðal eru væl tyngri, enn teir eru umborð á t. d. Havnarbátinum. Okkara miðalvekt er 87 kilo, meðan teirra er 80 kilo. Vit vóna sjálvsagt, at tað verður mótivindur í ólavsøkuróðrinum. Í kappingunum higartil hevur vindurin fyri tað mesta verið undan, staðfestir Rúni Lamhauge.

Eysturoyingurin kappast við Vestmenningin um næstfremsta plássið í FM kappingini. Vestmenningar eru betri fyri í tí kappingini. Um Eysturoyingur skal vera vísur í at vinna silvurmerkini í FM kappingini, so er neyðugt hjá teimum at vinna á ólavsøku. Men tað verður torført. Sjálvt um teir undan róðrinum royna at kobla úr og leggja allar sigrarnar og øll stigini eftir, áðrenn teir fara í bátin, so mugu teir umborð á Havnarbátinum finna seg í, at øll onnur rokna teir sum favorittar.

# Páll Fangi kennir seg hóttan

**Tær umborð á Sølmundi hava nógv at vinna aftur, og hjá manningunum í Havnini skal nógv til, áðrenn tær kunnu vinna á teimum í Klaksvík**

6-MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Eingin ivi er um, hvør er best í kvinnukappingini.

Páll Fangi hevur vunnið allar róðrarnar, og í dag skulu tær seta trumf á eitt framúr gott kappingarár.

Um talan verður um síðsta róðurin yvirhøvur við hesi manningini er ikki heilt greitt. Men tað er stórur møguleiki fyri, at onkrar av róðrargentunum fara at leita sær aðra staðir í útbúgvingarørindum, og so fer at verða tosað í Klaksvík um góðu 2001 manningina – akkurát sum tað í níti árunum hevur verið tosað um manningarnar, sum vunnu FM við Páll Fanga í 1986 og í 1987 og aftur í 1989 og í 1990.

### Kappast um silvur

Onkra ferðina hevur munurin aftur til næsta bátin verið trý sekund. Tað er umleið eina bátslongd. Men ofta hevur munurin verið tvífalt so langur, og á vestanstevnuni var tað einki, sum bendi á, at nakar av hinum bátunum á ólavsøku skuldi taka Páll Fanga.

– Venjingin hjá okkum hevur víst seg at hava verið nóg holl til at vinna fimm teir fyrstu kappingarnar. Nú uppundir ólavsøkuna hava vit hildið okkum til tað, sum hevur roynst so væl higartil. Vit hava ikki verið í Havn og vant, men vit vita, at teinurin er styttri, enn hann hevur verið á hinum stevnunum. Tað hevur við sær, at vit hava tey tøkini færri á lunninum. Startspurturin og endaspurturin verður eins langur, sum teir hava verið undanfarnu ferðirnar.

Hetta sigur Beinta Klakkstein, sum er ein av kvinnunum umborð á Páll Fanga.

Hvørjum báti rokna tit við at fáa mestu kappingina frá á ólavsøku?

– Vit frætta norður til Klaksvíkar, at tær venja nógv, og at tær siga, at nú ætla tær at taka okkum. Vit hava kappast mest við Jarnbard og Sølmund, so vit mugu rokna við størst kapping frá teimum, men tær umborð á Leirvíkingi hava eisini verið framvið fleiri ferðir, og so skulu vit ikki avskriva hvørki Gongurólv ella Hvessing.

Tær umborð á Sølmundi hava størsta partin av kappingarárinum verið best fyri í kappingini um silvurkrónurnar. Men á vestanstevnuni fingu tær einki stig. Tær hingu eftir í startinum, og tær vóru sera harmar um, at róðurin ikki varð skotin av. Sølmundur hevur framvegis møguleika at vinna silvurmerkini, men so skal vilja meiri enn illa til hjá Jarnbardi á ólavsøku.

## Støðan 10-mannafør

| | | |
|---|---|---|
| 1. Havnarbáturin | 1G | 35 |
| 2. Vestmenningur | | 23 |
| 3. Eysturoyingur | 1G | 21 |
| 4. Nólsoyingur | | 15 |
| 5. Skálabáturin | 1G | 11 |
| 6. Suðuroyingur | | 11 |
| 7. Vágbingur | | 0 |

## Støðan 6-mannafør kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 1. Páll Fangi | | 35 |
| 2. Jarnbardur | | 22 |
| 3. Sølmundur | | 18 |
| 4. Gongurólvur | | 11 |
| 5. Víkingur | | 8 |
| 6. Leirvíkingur | | 8 |
| 7. Riddarin | 1G | 4 |
| 8. Hvessingur | | 3 |
| 9. Fortuna | | 1 |
| 10. Lómur | | 0 |
| 11. Snopprikkur | | 0 |